### Formula-deildin

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | VB/S-B68 | Petur Reinert |
| 25.06 | Skála-EB/S | Dagfinn Olsen |
| 25.06 | GÍ-NSÍ | Georg N. Rasmussen |
| 25.06 | B36-ÍF | Lassin Isaksen |

### 1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 23.06 | VB/S-Royn | Milan Cimburovic |
| 24.04 | B71-FSV04 | Dan Højgaard |
| 24.04 | KÍ-HB | Rúni Gaardbo |
| 24.04 | TB-AB | Lars Müller |
| 24.04 | LÍF-SÍ | Jón Sigurd Gleðisheygg |

### 2. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 25.06 | KÍ-NSÍ | Bárður Mortensen |
| 25.06 | Skála-ÍF | Vinjard Dam |
| 25.06 | EB/S-B68 | Eugen Voda |
| 25.06 | Fram-GÍ | Thorvald Petersen |
| 25.05 | MB-B36 | Hentza Johansen |

### 1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 25.06 | EB/S-GÍ | Johnleif Gerðisá |
| 25.06 | B36-KÍ | Laurits í Króki |
| 25.06 | HB-NSÍ | Ørvur á Lag |
| 25.06 | SÍ-AB | FSV04 |

# Ert tú Føroya besti tippari?

**Saman við Formula.fo fer Sosialurin nú undir kapping, har besti tipparin í landinum skal finnast. Tippast kann á heimasíðu okkara, sosialurin.fo, og føroyskur fótbóltur og HM-fótbóltur eru fyrstu kappingarnar á skránni**

TIPPING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At tippa um ítróttarúrslit er eitt ítriv, sum hevur røtur líka so langt, sum ítrótt hevur verið iðkað. Serstakliga í Bratlandi og teimum londum, sum hava verið undir bretsku krúnuni, er drúgv siðvenja fyri hesum, men eisini her heima hava fólk leingi tikist við tipping. Veruliga skipað viðurskifti komu nokk ikki, fyrr enn Ítróttarvedding fekk donsku Tipstænastuna inn á føroyska marknaðin, og síðani hevur ítrivið verið ein fastur partur av tí, sum ítróttarfólk og –áhugað hava tosa, gitt og kjakast um.



### Fleiri kappingar í einum

Nú fer Sosialurin undir at finna fram til, hvør besti veddarin í Føroyum er. Saman við Formula.fo er ein serstøk skipan gjørd, og við at tekna teg á hesa, ert tú eisini við í kappingini um at gerast besti tipparin í landinum. Ella kanska skuldu vit sagt kappingunum, tí talan verður um meira enn tí einu av slagnum. Og hópatals vinningar standa upp á spæl í hesum.

Størsta kappingin fevnir sjálvandi um dystirnar í Formula-deildini, har fyrsta tippingarumfarið er leygar- og sunnudagin. Umframt at besti tipparin verður funnin, tá 27. og seinasta umfarið er spælt, fær besti tipparin í hvørjum mánaði sær eisini ein vinning.

Og umframt føroyskan fótbólt, verður talan eisini um fleiri aðrar kappingar. Nú HM-endaspælið kemur til alt-ella-einki dystirnar, har tey seinastu 16 kappast, verður talan sjálvandi um kapping, og í heyst fáa vit millum annað Champions League fótbólt á skránna. So tað er eingin sum helst vandi fyri, at fótbóltshugaði føroyingurin fer at keða seg, hóast heimliga kappingin fer í dvala.

# Reglurnar

**Soleiðis er stigagevingin í nýggju tippingarkappingini hjá Sosialinum og Formula.fo. Tilmelding til kappingina og sjálv tippingin fer fram á www.sosialurin.fo**

TIPPING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hættirnir, sum tippað verður eftir, eru ymiskir. Við vanligu 13-kuponini hjá Tipstænastuni skal rætta útfallið í ymsu dystunum finnast. Altso hvør parturin vinnur, ella um talan kanska verður um javnleik.

Hinvegin innihalda ymsu skipanirnar til oddsveddingar hópin av tilboðum. Alt frá hvør vinnur dystin, til hvør fær fyrsta ella seinasta hornasparkið í dystinum.

Í skipanini, sum Formula.fo hevur ment, skal úrslitið í hvørjum dysti sær gitast. Og tá staðfestingin fyriliggur, eru fleiri hættir at fáa stig uppá. Trý stig verða lætin fyri at hava rætta vinnaran ella møguliga javnleikin. Eitt stig verður latið fyri at hava munin í málum rættan. Og somuleiðis verður eitt stig latið fyri at gita rætta máltalið hjá hvørjum liði sær.

Sum dømi kunnu vit taka dystin, sum HB og GÍ spældu í Gundadali tann 16. juni. Tann dysturin endaði 1-2, og niðanfyri hava vit sett nøkur hugsað dømi um, hvussu úrtøkan í veddingarkappingini kundi verið av hesum dystinum.

**Tú tippaði 1-0**
Eitt stig verður latið fyri máltalið hjá HB, sum tú hevði rætt.

**Tú tippaði 2-2**
Eitt stig verður latið fyri máltalið hjá GÍ, sum tú hevði rætt

**Tú tippaði 0-2**
Fýra stig verða latin. Trý fyri at hava rætta vinnaran, og eitt fyri máltalið hjá GÍ, sum var rætt.

**Tú tippaði 3-4**
Fýra stig verða latin. Trý fyri at hava rætta vinnaran, og eitt fyri at hava rætta munin í málskoruni.

**Tú tippaði 1-2**
Seks stig verða latin. Trý fyri at hava rætta vinnaran. Eitt fyri at hava rætta munin í málskoruni. Eitt fyri at hava máltalið hjá HB rætt og eitt fyri at hava máltalið hjá GÍ rætt.

## 24 ár síðani ÍF fekk fult

**B36 ætlar ikki, at kiksarin á heimavølli móti einum av teimum lægru staddu skal endurtaka seg**

B36-ÍF
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fuglfirðingar plaga ikki at trívast nakað serligt í Gundadali. Tað siga hagtølini. ÍF hevur ikki vunnið móti B36 í høvuðsstaðnum síðani í 1982, tá ið teir vunnu 2-0. Í fjør eydnaðist tó at røkka 1-1, eftir at ÍF hevði verið á odda. Tað man vera tað avrikið ímóti meistarunum, sum Petur Simonsen skal vísa sínum spælarum á undan ferðini til Havnar.

Í vár vann B36 3-1 í Fuglafirði, men ta ferðina var ÍF avgjørt ikki niðurspælt.

Fuglfirðingar eru skerdir, tí Bartal Eliasen fyri aðru ferð í ár er leikbannaður. Eyðun Ryggshamar var ikki við í málleysa javnleikinum móti KÍ. Hann koykti fótin í síðstu viku. Í hesi vikuni hevur hann vant alt meiri, og tað verður vónað, at stríðsmaðurin verður á miðvøllinum.

Iulian Florescu vandi við ÍF mánakvøldið, men síðani hevur hann ikki verið at síggja í Fuglafirði.

B36 spælir fyri tíðina ímóti teimum niðastu á støðutalvuni. Teir megnaðu sunnudagin tepran 1-0 sigur á Toftum, eftir at teir á heimavølli ikki høvdu megnað meiri enn 2-2 ímóti VB/Sumba. Tað avrikið ella ikki avrikið ætla teir ikki skal endurtakast nú sunnudagin.

Allir B36 spælararnir eru tøkir uttan teir báðir, sum eru langtíðarskaddir. Men tað kann hugsast, at samansetingin av teimum fyrstu ellivu fer at verða øðrvísi móti ÍF, enn hon var á Toftum.